## DAGSINS MEINING

# Avtakið favoriseringina av Danmark!

Vit sóu herfyri eina avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini um skrásetingargjald fyri ein bil, ið var innfluttur sum flytigóðs til Føroya. Henda avgerð vísir, at har onnur lond royna at standa við opnum ørmum fyri at fáa sínar landsmenn uttanlands heimaftur, so stendur føroyska samfelagið klárt við einum vátum vøtti frammaná til hesi fólkini, ið flyta aftur á klettarnar. Hetta er væl at merkja, um man hevur dittað sær at búð nakra aðrastaðni enn í Danmark. Toll- og Skatt hevur av onkrari óskiljandi orsøk innført eina favorisering, sum bert umfatar Danmark.

Um ein býr uttanlands og skal flyta aftur til Føroya, so kann ein taka bilin við sum flytigóðs uttan avgjøld og skrásetingargjald, um so er at viðkomandi hevur búð uttanlands í minst 3 ár og hevur havt bilin skrásettan uttanlands í minst 2 ár. Vit hava við avgerðini hjá skatta- og avgjaldskærunevndini fingið váttað, at absolutt stirvnasta tulking verður løgd til grund, har bilurin reint fysiskt skal hava verið uttanlands í hesi 2 árini, tá tað um skrásetingargjald umræður. Um ein hevur búð í Danmark, so skal ein hava búð uttanlands í eitt ár og hava havt bilin skrásettan í minst eitt hálvt ár.

Hví er hesin munurin? Hvør politikari hevur avgjørt at Danmark skal favoriserast framum alla verðina? Hvør er boðskapurin til føroyingar sum búgva uttanlands, og ætla sær heimaftur? Boðskapurin er, at ein er ikki vælkomin, uttan so at ein hevur búð í Danmark.

Vit umrøddu henda spurning á hesum stað herfyri, men sum so ofta fyrr, so er eingin reaktión frá Fíggjarmálaráðnum.

Nú má vend koma í! Vit tosa um altjóðagerð og at Føroyar skal verða fremsta land í heiminum í 2015. Hetta krevur, at man líkastillar øll lond, eisini tá um flytigóðs umræður, so at man við hesum signalerar, at Føroyar slær hurðarnar á víðan vegg fyri at fáa sítt útbúna fólk heimaftur – ikki bara úr Danmark – men úr øllum heiminum. Broytið sum skjótast kunngerðina fyri flytigóðs, so øll lond fáa somu treytir sum Danmark!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Pisa kanningin og miðnámsútbúgvingarnar

**EYÐGUNN SAMUELSEN,**
leiðari fyri HT útbúgvingina



Nógv er skrivað og sagt síðan Pisa-kanningin var almennakunngjørd, og er hetta tjak eitt av teimum góðu úrslitunum, ið kanningin hevur viðført.

Útfrá mínum royndum sum undirvísari í yrkisútbúgvingunum og HT útbúgvingini í 17 ár fari eg at koma inn á nakrar hugleiðingar um, hvussu skapast kann ein betur samanhangur ímillum fólkaskúla og miðnám.

Tosað verður nógv um hugburð og disiplin, men um hetta loysir fleiri trupulleikar enn tað skapar veldst um, hvussu ein tulkar hesi hugtøk. Eitt ið er av alstórum týdningi er at hyggja at, hvat fyri førleikar, ið ein miðnámsútbúgving krevur. Við visión 2015 hevur landsstýrið sett sum mál, at øll ung skulu antin hava eina yrkisútbúgving ella eina miðnámsútbúgving. Tí má skúlin eisini arbeiða við at náa hesum máli. Eitt sum nógv ikki eru varug við er, at krøvini í dag til næmingarnar í eini yrkisútbúgving og eini miðnámsútbúgving eru so lík, at lesiveikir næmingar ikki eru førir fyri at nema sær eina yrkisútbúgving. Tí vera alt fleiri næmingar, ið søkja inn á eina yrkisútbúgving ikki upptiknir og hava síðan ongan møguleika í okkara skúlaverki í dag.

Krøvini til næmingarnar í eini miðnámsútbúgving/yrkisútbúgving eru:

- eitt ávíst fakligt grundstøði
- at teir duga at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt
- at teir hava hugflog, duga at finna og fyrihalda seg til nógva ymiska vitan
- at teir duga at samanflætta vitan frá fleiri lærugreinum og nýta hana í nógvum ymiskum samanhangum
- at teir hava ein arbeiðshugburð

Hesir førleikar eru í stóran mun teir somu førleikar, ið bæði almenna og privata vinnan krevur í einum nýmótans samfelag.

Skulu hesi mál náast so eri eg vís í, at tey ikki verða rokkin við tí disiplin, ið vit kenna frá gamlari tíð av og sum bert leggur dent at tiga og gera sum tú fært boð um. Hugflog og sjálvstøðug hugsan verður ikki ment á henda hátt. Men vera tey ungu lærd upp við at krøv vera sett til tey, og at tað hevur avleiðingar um ein ikki lúkar krøvini, so eru vit á rættari kós.

Somuleiðis má hugburðurin til skúlaarbeiðið stimbrast, og tað verður hann, um tað er stuttligt og spennandi at læra. Harnæst hevur tað stóran týdning, at næmingarnir vera eftirmettir, til dømis tá ið teir hava arbeitt við eini verkætlan, og at úrslitini vera brúkt til nakað. Kenni bæði av egnum royndum og frá øðrum foreldrum, at børnini arbeiða við lív og sál í eini verkætlannarviku, men fáa lítla og onga eftirmeting av teirra arbeiði. Er hetta rætt, so má tað minka um arbeiðshugin næstu ferð.

Ein annar trupulleiki í samband við hugburð er, at tað onkusvegna er "ócool" at vera "nørdur" millum næmingarnar sjálvar, so teir næmingar, ið hava hug at arbeiða í skúlanum gera tað ikki, tí teir vilja ikki vera nevndir nørdar. Henda hugburð má tað setast inn fyri at broyta.

Sjálvt um kanningin vísir, at tað sosiala virkar væl innan skúlans gátt, so er tað ikki ókent á miðnámsskúlunum, at ein bólkur er so bundin at teldutøknini, at tað er trupult hjá teimum at samskifta og samstarva við onnur í tann mun, ið er neyðugt um tey skulu megna at gjøgnumføra eina miðnámsútbúgving.

At broyta hugburð er ikki ein spurningur um pengar, men skal fólkaskúlin betrast krevur tað heilt víst eisini meiri pening. Pening til eftirútbúgving av lærarum, ið hevur verið forsømd í nógv ár, pening til at styrkja leiðslunnar við og ikki minst pening til útgerð, serliga til at hava nýggjastu tøknina atkomiliga fyri allar næmingar, er neyðugt um vit skulu hava ein góðan skúla í framtíðini.

# Takk Havnar Bio

**DÁNIAL Á DUL JACOBSEN**
Samkomuleiðari



Nú ormurin úr Eden ger seg til reiðar, hesuferð í filmataseraðari útgávu, at sprænа eitur sítt, so er Havnar Bio knappliga komin í heimsins brennidepil. Allur tann "frælsi" heimurin er á gosi, tí ein, í alheims høpi, týdningarleysur biografur í Havn noktar at vísa filmin "The Da Vinci Code".

Sjálvur má eg viðganga, at eg eri ómetaliga glaður fyri, at tað júst vóru Føroyar, sum megnaðu at gerast tann lítli, irriterandi steinurin í skónum hjá tí sokallaða frælsa heiminum.

Takk Havnar Bio og takk Jákup Eli, tí tá tann lítli steinurin er rætt plaseraður, kann hann fella sjálvan Goliat.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.